

*Samgongan hevur rokast sum í grindadrápi seinastu vikurnar. Úrslitið av ruðuleikanum var, at Høgni Hoydal mátti lúta fyri hóttanum og hørðum trýsti frá Anfinn Kallsberg*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Høgni bakkaði

**Málini hjá Høgna Hoydal um bundnan sjálvstýrisleist og um at staðfesta sjálvsavgerðarrætt føroyinga vórðu ikki løgd fram á tingfundinum leygardagin. Tað eydnaðist løgmanni eftir drúgva telving at vinna á Høgna Hoydal**

BAKGRUND
*John Johannessen*

Tað eydnaðist Anfinn Kallsberg, løgmanni, at fáa Høgna Hoydal at bakka í trætuni um sjálvstýrismálið.

Høgni Hoydal tók leygardagin eftir drúgva umhugsunartíð og harðar samráðingar aftur tey bæði uppskot síni um ávikavist bundnan sjálvstýrisleist og um at staðfesta sjálvsavgerðarrætt føroyinga, sum hann bar Løgtingsskrivstovuni mikudagin.

– Eg valdi at missa andlit heldur enn at missa alt sjálvstýrismálið á gólvið, segði Høgni Hoydal beint eftir tingfundin.

Tað, at formaður Tjóðveldisfloksins tók uppskot síni aftur, hendi beint eftir, at Unga Tjóðveldið og landsstýrismaðurin og tjóðveldismaðurin, Tórbjørn Jacobsen, á fólkafundi høvdu kravt av løgmanni, at uppskotini skuldu leggjast fram. Kortini bleiv tað ikki løgmaður, men formaður Tjóðveldisfloksins, sum bakkaði.

## Rok í tvær vikur

Trætan millum løgmann og Høgna Hoydal tók seg av álvara upp næstseinasta fríggjadag, tá løgmaður boðaði samgonguflokkunum frá, at hann ikki tók undir við einari fólkaatkvøðu 26. mai um ein bundnan sjálvstýrisleist, eins og samgongan hevði boðað øllum Føroya fólki frá á tíðindafundi 1. februar.

Í staðin legði løgmaður fram eitt nýtt uppskot, ið ikki innibar fólkaatkvøðu, men miðaði, eins og sjálvstýrislóg Javnaðarfloksins, ímóti at gera djúptøknar broytingar í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark við øktum føroyskum sjálvstýri fyri eygað.

Hetta skapti øði í samgonguni, sum skiltist frá samgongufundi samd um at vera ósamd eina viku, til løgmaður kom aftur av almennari vitjan í Bretlandi, sum hann skuldi á dagin eftir.

## Deadline hjá landsstýrinum

Mikudagin, meðan løgmaður var burturstaddur, var seinasta freistin at lata Løgtingsskrivstovuni tey mál, sum skuldu leggjast fram hesa tingsetuna. Tí var neyðugt hjá Høgna Hoydal at taka upp leiklutin sum løgmaður og halda formellan landsstýrisfund, fyri at avgreiða tey seinastu landsstýrisuppskotini og bera Løgtingsskrivstovuni tey.

Høgni Hoydal gav boð um, at hesin landsstýrisfundurin skuldi vera mikumorgunin klokkan níggju. Á fundinum ætlaði Høgni Hoydal umframt øll hini málini eisini at fáa avgreitt málið um sjálvstýrisleistin við fólkaatkvøðu og uppskotið um at samtykkja sjálvsavgerðarrætt Føroya fólks, sum løgmaður hevði boðað frá, at hann ikki longur tók undir við.

Løgmaður frætti hetta til Bretlands og sendi mikumorgunin hvassorðað telefax heim til Høgna Hoydal.

– Um hesi málini fara niðan í løgtingið, uttan at flokkarnir í samgonguni eru samdir áðrenn, meti eg hetta sum so stórt álitisbrot, at eg taki hetta sum uppsøgn av politiska samstarvinum. Tí fari eg einaferð enn at fráráða tær hetta, segði løgmaður millum annað í brævinum til Høgna Hoydal.

## Fundurin útsettur

Brævið frá løgmanni gjørdi, at Høgni Hoydal útsetti landsstýrisfundin; fyrst til á middegi og síðani til klokkan 13.

Tíðina fram til landsstýrisfundin brúkti Høgni Hoydal til at sannføra løgmann um, at hann ikki bar seg skeivt at, men harafturímóti handlaði eftir gjørdum avtalum. Høgni Hoydal sendi løgmanni svar umvegis faxið og tosaði eisini fleiri ferðir við hann í telefon.

Í brævinum harmast Høgni Hoydal um framferðina hjá Fólkaflokkinum og løgmanni seinastu tíðina. Høgni Hoydal gjørdi vart við, at støðan hevði verið kaotisk, eftir at Fólkaflokkurin boðaði frá, at hann vildi avlýsa avtalaðu fólkaatkvøðuna og í staðin almannakunngjørdi sítt egna uppskot um eina loysn innan fyri ríkisfelagsskapin. Við hesum metti Høgni Hoydal høvuðssetningin hjá samgonguni um fullveldi vera sleptan.

– Eftir, at eg havi fingið fax frá tær, har tú sigur samgongusamstarvið upp, um málið um fólkaatkvøðuna fer í tingið, tykist kaosið at vera fullkomið.

– Tað er eftir mínum tykki ábyrgdarleyst at brúka hóttanir í politikki. Tað er ábyrgdarleyst, at fullveldismálið, sum vit eftir drúgvar og neyvar viðgerðir hava verið fullsamd um at loysa, skal gevast upp fyri skutil, skrivaði Høgni Hoydal millum annað í brævinum til løgmann.

Høgni Hoydal ger løgmanni greitt, at hann ikki kann liva við, at fullveldismálið fer fyri skeyti í partapolitiskum taktikki, gruggi og trýsti. Hann staðfestir, at samgongufloкkarnir eru ósamdir um fólkaatkvøðuna. Samstundis staðfestir hann, at ósemja ikki hevur verið um sjálva fullveldistilgongdina og rættin til sjálv at stovna Føroyar sum fullveldisríki.

Tí boðar Høgni Hoydal løgmanni frá, at hann ikki fer at leggja fyri tingið uppskotið um sjálva fólkaatkvøðuna. Men at hann fer at leggja fyri landsstýrisfundin løgtingslógaruppskotið um sjálvan fullveldisleistin uttan fólkaatvøðu og uppskotið um at staðfesta sjálvsavgerðarrættin og fáa hesi niðan í tingið.

– Harvið verður ein møguleiki hjá fullveldissamgonguni at hóra undan, royna at lekja sárini og røkka sínum máli, staðfestir Høgni Hoydal í brævinum til Anfinn Kallsberg.

## Rokið stendur við

Men ikki bar til at mýkja løgmann.

Høgni Hoydal setti landsstýrisfundin eitt sindur seinni enn klokkan 13 og royndi at fáa tey umleið fimti landsstýrismálini avgreidd áðrenn Løgtingsskrivstovan stongdi klokkan 16.

Men tað tók tíð at viðgera øll málini, og ósemjan millum landsstýrisfólkini var stór um ætlanirnar hjá Høgna Hoydal. Tí var neyðugt at fáa avtalu í lag við Løgtingsskrivstovuna um, at málini kundu koman niðan eitt sindur seinkað. Hetta varð játtað, og tá klokkan nærkaðist hálvgum seks seinnapartin mikudagin, vóru uppskotini hjá Høgna Hoydal farin niðan til Løgtingsskrivstovuna.

Hetta skapti mikið rumbul. Landsstýrisfólkini hjá Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen og Bjarni Djurholm, gjørdu vart við, at tey ikki høvdu sæð uppskotini, og at Høgni Hoydal bara av sínum eintingum hevði latið løgtinginum tvey mál uttan at viðgera tey á landsstýrisfundinum.

Høgni Hoydal avvísti hesum og gjørdi greitt, at hetta ikki var rætt. Hann staðfesti, at uppskotið um sjálvstýrisleist var tað sama, sum samgongan hevði viðgjørt og verið samd um í langa tíð, men bert uttan fólkaatkvøðu. Tí var tað ikki rætt, at hann hevði borið eitt lógaruppskot í løgtingið uttan samgongunnar vilja.

Grundgevingarnar hjá Høgna Hoydal hjálptu tó ikki.

Í beinleiðis kjaksending í Útvarpinum, sum varð send beinleiðis úr Tinganesi beint eftir landsstýrisfundin, var harður orðadráttur millum Høgna Hoydal fyri Tjóðveldisflokkin, Helenu Dam á Neystabø fyri Sjálvstýrisflokkin og Jørgen Niclasen fyri Fólkaflokkin. Serliga var tað Jørgen Niclasen, sum fanst harðliga at Høgna Hoydal.

Samstundis kom enn ein beinleiðis hóttan um samgonguslit úr London. Løgmaður gjørdi gjøgnum Útvarpið og InternetSosialin vart við, at um Høgni Hoydal ikki tók uppskotini aftur, hevði Tjóðveldisflokkurin meldað seg úr samgonguni.

Men meira hendi ikki í fyrstu atløgu. Høgni tók ikki málini aftur, og løgmaður valdi at bíða við at gera meira við málið, til hann kom heim aftur til Føroya. Sostatt fingu vit eitt óhaldbært vakum í politiska lívið í Føroyum.

## Tinganes lukkað land

Løgmaður kom heim til Føroya hóskvøldið. Men hóast landið var í politiskari undantaksstøðu og fólk ivaðust í, um vit høvdu eina samgongu ella ei, valdi løgmaður einki at gera við málið fyrr enn hann hevði hvílt seg.

Heldur ikki vildi løgmaður umvegis miðlarnar kunna Føroya fólk meira um støðuna. InternetSosialurin royndi fleiri ferðir hóskvøldið at fáa fatur á løgmanni, men hetta bar ikki til. Í staðin vóru boðini umvegis Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóra, at løgmaður var troyttur eftir ferðina í Bretlandi og ætlaði sær at kanna støðuna nærri og hvíla seg, áðrenn hann fríggjadagin fór at gera meira við málið.

Fríggjadagin tók løgmaður umsíðir stíðið upp í største álvara. Hann fór fyrst á fund við flokkin hjá sær, har hann fekk fulla heimild sjálvur at taka støðu í málinum. Høgni Hoydal var eisini á fundi við sín flokk, og seint seinnapartin møttust teir tríggir samgonguleiðararnir, Anfinn Kallsberg, Høgni Hoydal og Helena Dam á Neystabø við eitt tómt fundarborð á skrivstovuni hjá løgmanni at loysa samgonguknútin. Lagnufundurin var settur.

Fundurin gjørdist drúgvur. Tey trý fundaðust til út á náttina og tóku fundin upp aftur dagin eftir. Telvað varð aftur og fram fyri at finna eina semju, men á døgurða leygardagin skiltust samgonguleiðararnir uttan at vera komin til nakra semju.

Tingmanningarnar vórðu nú kallaðar inn. Samgongan var um at bresta. Høgni Hoydal helt fast við, at hann fór at leggja uppskot síni fram á tingfundinum klokkan hálvgum tvey, og løgmaður helt fast við kravið um, at uppskotini skuldu takast aftur.

Tað eydnaðist kortini at fáa tingfundin útsettan til klokkan 17, meðan fólk sótu á Gamla Apoteki og stríddust við at klinka samgonguna saman. Nógv varð runnið millum floksrúmini, men einki ítøkiligt kom burturúr.

## Vistu einki

Eftir ein ógvuliga rokmiklan dag á Gamla Apoteki við stórum fólkafundi uttanfyri, ið kravdi, at uppskotini hjá Høgna Hoydal vórðu løgd fram, varð farið niðan í tingið eitt sindur yvir klokkan 17, uttan at nøkur semja var funnin.

Løgmaður og Fólkaflokkurin stóðu fast við, at uppskotini hjá Høgna Hoyal skuldu ikki fyri tingið, og eingin visti, um Høgni fór at lata tingformannin leggja tey fram ella ikki.

Tinghúsið var stúgvandi fult av fólkið, og uttan fyri vóru mótmælisfólk við stórum skelti við undirskriftum, ið heittu á løgmann um at lata uppskotini verða løgd fram.

Hóast tingfundurin skuldi verða settur klokkan 17, gekk meira enn ein tími áðrenn hann varð settur. Fundast varð dúgliga á tinghúsloftinum, og Tjóðveldisflokkurin sat leingi í einrúmi, meðan ein hópur av tíðindafólki og øll ting- og landsstýrismanningin bíðaði uttanfyri.

Men einki frættist. Tingfundurin varð settur, og løgtingsformaðurin fór at lesa upp listan av málum, sum vórðu løgd fram. Fólk bíðaðu í spenningi, og ikki fyrr enn tingformaðurin var liðugur at lesa var greitt, at málini ikki vóru løgd fram.

– Eg valdi at missa andlit heldur enn at missa alt sjálvstýrismálið á gólvið, vóru orðini frá Høgna Hoydal, eftir at hann hevði tikið hørðu avgerðina at bakka fyri løgmanni og taka uppskot síni aftur.



*Í sambandi við samgongustríðið hevur ljóðað, at Fólkaflokkurin royndi at fríggja til Javnaðarflokkin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*





*Tað gekk meira enn ein tími frá ásettu tíðini fyri tingfunin klokkan 17 leygardagin, til fundurin varð settur. Seinastu royndirnar á tinghúsloftinum vóru orsøkin. Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin sótu í hvør sínum rúmi og skiftust at ganga inn til hvønn annan*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Unga Tjóðveldið hevði savnað undirskriftir á eitt mótmælisskelti, sum varð sett við inngongdina til løgtingið, tá løgmaður kom á tingfund*
*Mynd: Jens Kristian Vang*